# LJÓSIÐ



– Við ljósinum kanst tú byggja upp undir tekstin í eini framførslu, sigur Poul Martin Joensen, ljósmaður í Kelduni í Skálafirði. Á Fjarðafestivalinum fara Poul Martin (vinstrumegin) og Pól Høj at skipa ljósið og roykin á pallinum

Mynd: Jens Kristian Vang

## Reytt er rætt

Ein avgerandi fortreyt fyri at kunna vera ljósmaður er, at man elskar tónleik. Tað ger Poul Martin í øllum førum.

Honum dámar væl at hyggja og lurta eftir bólkum sum spæla, – fyrst og fremst eftir tónleikinum, men eisini eftir hvussu aðrir ljósmenn arbeiða.

Sum komandi flogskipari veit hann alt um, hvussu týdningarmikið tað er, at tann reyða ávaringarlampan í stýrihúsinum ikki fer at lýsa.

Men sum ljósmaður kann ein júst við litunum – eisini tí sterka reyða – vera við til at byggja upp undir tekst og lag hjá tí sum framførir.

– Summir ljósmenn programmera alt frammanundan, og seta bara ein diskil í fløguna, og so koyrir tað bara.

– Mær dámar nógv betur, at vera til staðar og heldur arbeiðir beinleiðis á staðnum og í »freestyle«. Tað gevur mær í øllum førum meiri, sigur Poul Martin avgjørdur.

## Tónleikur er tónleikur

Poul Martini dámar ymiskan tónleik, men fyri hann er eingin munur:

– Nei, fyri meg er tónleikur tónleikur. Men tað kann sjálvandi vera munur á innihaldinum í tekstunum. Júst hetta er tað sum ger arbeiðið sum ljósmaður so spennandi: At ein sleppur at seta sín egna dám á framførsluna hjá einum tónleikara. Og hjá einum ljósmanni er tí líkamikið, hvat slag av tónleiki ið talan er um.

– Eg hugsi bara sum so, at um tónleikurin er øgiliga góður og villur, so skal ljósið eisini fylgja við tí.

– Hetta er okkara avbjóðing, sigur Poul Martin Joensen.